


## Sjómenn krevja endurgjald

Býarrætturin í Keypmannahavn skal nú taka støðu til, um fýra menn, sum vóru við danska farmaskipinum Danica White, kunnu krevja endurgjald frá reiðaríinu fyri tíðina, sum teir vóru gíslar hjá somaliskum sjórænarum. Teir fýra sjómenninir vóru gíslar saman við skiparanum í 83 samdøgur í 2007, eftir at skip teirra bleiv tikið millum Dubai og Mombasa í Kenya, men sluppu leysir, tá reiðaríið rindaði sjóræналunum loysigjald. Teir fýra menninir krevja at fáa millum 300.000 og 400.000 krónur hvør, og danska sjómannafelagið tekur undir við krøvum teirra, sigur formaðurin, Søren Sørensen, við DR-kringvarpið.

## Airbus vendi aftur

Eitt flogfar hjá grønlendska flogfelagnum Air Greenland við 245 ferðafólkum umborð vendi aftur til Syðra Streymfjørðin í gjár, stutt eftir at tað var farið haðani við kós ímóti Keypmannahavn. Tá flogfarið hevði flogið umleið ein hálvan tíma, varnaðist flogskiparin, at eitt ávaringarljós var í ólagi, og hann gjørdi av at venda aftur. Air Greenland sigur, at flogfarið kundi hildið leiðina fram til Keflavíkar í Íslandi, har brekið kundi verið rættað. Grønlendska flogfarið er av slagnum Airbus A330 ella sama slag sum Air France-flogfdarið, sum datt niður í Atlantrshavið fyri einum mánaði síðani.

# Tað verða ikki seks

**Uni Leitisstein Hansen, tónleikaummælari, Katrin Petersen, ein av fyriskiparunum til G!-festivalin og Niels Arge Galán, tónleikari, meta, at tað er lítið sannlíkt, at Føroyar aftur í 2010 fara at hýsa seks tónleikafestivalum**



FESTIVALAR

*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

*Hvussu vilt tú lýsa ársins festivalsummar?*

HANSEN: Umfatandi, spennandi, fjøltáttað, feitt.

PETERSEN: Tað líkist einum ordans tiltaks, stevnu, fagnaðar og festivalsummari! Ómetaliga nógv tiltøk. Helst er útboðið í so stórt. Eisini hóast tiltøkini royna at fáa sær síni egnu eyðkenni og smakk.

GALÁN: Tað er føroyskt, og tað er nógv.

*Sæst framgongd á festivalunum?*

HANSEN: Ja, so avgjørt - kanska serliga fyriskipanarliga. Fyriskipararnir hava lært nógv av teimum mistøkum, ið eru gjørd undanfarin ár, og tað er deiligt at síggja. Tónlistarliga eru festivalarnir eisini við at finna eitt støði, ið sømir seg. Ein yvirgang royndu allir at yvirganga hvønn annan við kostnaðarmiklum útlendskum nøvnum, og tað tænti ikki nøkrum, tí festivalarnir mundu avlívað seg sjálvar.

PETERSEN: Hyggja vit at gongdini frá fyrsta G!-festivalinum til í dag, er kunningin væl størri fyri at skipa fyri tílíkum tiltøkum. Ein stórur hópur av fólki er nú, sum veit um innrætting av festivaløki, trygd á uttandura pallum, og alt møguligt annað, sum hoyrir einum festivali til. Um 2009 fer at vera eitt ár við serligum lopi í festivalmenningini, veit eg ikki fyrr enn í august!

GALÁN: Tað kann eg ikki siga, fyrr enn eg havi vitjað ein av teimum stóru festivalunum.

*Kemur tað óvart á teg í hesum búskaparligu tíðum, at so nógvir festivalar verða?*

HANSEN: Ja, tað ger tað. Keypiorkan hjá fólki er nógv minkað í tráð við at virksemið í samfelagnum er lækkað. Eg haldi tó, at festivalarnir hava dugað væl at tillaga ambitiónirnar og skráirnar eftir tí sannroynd, at vit liva í niðurgangstíðum. Serliga G! hevur megnað at sett saman ein frálika G!-skrá uttan at brúka alt ov nógv av pengum.

PETERSEN: Eg vænti, at øll tiltøkini eru gitin, áðrenn fíggjarkreppan varð veruleiki – um heystið í 2008. Og at eingin helt tað standa so illa til, at neyðugt var at drepa dreymin. Tað er als ikki eitt keðiligt tekin fyri eitt samfelag, at fólk trúgva upp á sín egna dreym. Hinvegin meti eg, at hóast fyrireikararnir ikki hava avlýst síni tiltøk, sæst kreppan kortini á allarflestu størru tiltøkunum. Tey flestu eru onkursvegna varin ella kýta seg at laga betur til sín kjarnumálbólk, heldur enn at dúva upp á at fáa øll við.

GALÁN: Einaferð segði ein klókur maður, at tá samfelagið er í kreppu blómar listin. Vónandi halda festivalgestirnir tað sama.

*Hvør er orsøkin til, at Føroyar hýsa heili seks festivalum í ár?*

HANSEN: Í stóran mun tilvild, vænti eg. Tað er nærliggjandi at hugsa, at Við Múrin er sprottin burtur úr tí vakum, ið kom í kjalarvørrinum frá húsaganginum hjá G!. Tað var leingi ivi um, hvørt G! yvirhøvur fór at fóta sær aftur, og tað er hesin ivin, fyriskipararnir av Við Múrin hava gjørt sær dælt av. Hinar festivalarnar kenna vit frá fyrr av, og teir eiga hvør í sínum lagi sítt pláss.

PETERSEN: Eg meti, at tekin eru um, at fleiri av tiltøkunum eru farin at málrætta seg betur. Fólkini handan tiltøkini hava funnið ein form, sum hóskar til teirra. Eg hugsi eitt nú um Fjarðafestivalin. Fyrireikararnir tosaðu í ár meira beinleiðis enn undanfarin ár um, at Fjarðafestivalurin var ein kristin festivalur fyri kristin fólk. Og Jóansøkufestivalurin hevur lagt seg meira eftir at vera ein partur av Jóansøkuni, heldur enn at kappast við gamla stevnuformin. At festivalarnir finna sín samleika kann gera teir smalri og draga ein minni áhoyraraskara. Men afturfyri er talan um tann rætta skaran – tey, sum meta hetta vera besta tiltakið til teirra.

GALÁN: Eg meti meg vera aldeilis ókvalifiseraðan at svara hasum spurninginum.

*Er tað pláss fyri seks festivalum í Føroyum?*

HANSEN: Nei, tí tað siga royndirnar okkum. Í 2005 vóru eisini fimm stórir festivalar, og tað gekk ikki fíggjarliga. MjúS lá eftir á, meðan Jóansøkufestivalurin mátti tillaga seg. Eg haldi tó, at í mun til 2005, so hava festivalarnir - heldur enn at royndt at yvirganga hvønn annan - dugað betur at funnið sínar egnu nitsjur. Einasti ókendi faktorurin er í grundini festivalurin Við Múrin, ið tónlistarliga hevur lagt seg mitt millum G! og Summarfestivalin. Meðan Trentemøller og Dj Tiesto eru nøvn, ið eg hevði væntað at upplivað á G!, eru Anna David og Ace of Base so avgjørt nøvn, eg hevði væntað at sæð á skránni hjá Summarfestivalinum. Tískil verður tað spennandi at síggja, hvussu stórt innvik í áskoðaragrundarlagið hjá G! og Summarfestivalinum, Við Múrin fer at gera.

PETERSEN: Nei. Ikki í fleiri ár. Møguliga er pláss fyri trimum festivalum í G!-stødd og trimum minni í ár, tí fólk, vegna búskaparkreppuna, velja at ferðast í egnum landi, og heldur fara á fleiri festivalar enn uttanlandsferðir í suður-Evropa. Men upphæddin, sum føroyingar nýta til undirhald og mentan, fer ikki til tónleikafestivalar í allar ævir. Næstu ferð eitt frálíkt hugskot verður, fara pengarnir at flyta seg yvir hagar. Hvar og hvat tað fer at vera, veit eg sjálvsagt ikki.

GALÁN: Um allir festivalarnir finna sína egnu nissju og ikki kappast beinleiðis, skuldi tað borið til. Men um allir fara eftir øllum kann vandi verða fyri, at tað verður tunt onkustaðni...

*Væntar tú, at somu festivalar verða aftur í 2010?*

HANSEN: Summarfestivalurin og G! eru so mikið sterk brand, at vit skulu venja okkum við, at hesir festivalar eru fastir tættir í føroyska summarinum. Tað saman kann sigast um Fjarðafestivalin, ið hevur eina sera væl útgreinaða og trúgva áhoyrarafjøld. Asfalt er hin føroyski festivalurin - nærmast ein kvøða ella framsýning av føroyskum tónleiki.

Eg eri eitt sindur í iva um Við Múrin. Skráin sær rættiliga kostnaðarmikil út, og tískil er bogin hart spentur. Svíkja havnafólk



*Katrin Petersen*
*Ein av fyriskiparunum av G!-festivalinum*

**“Fólkini handan tiltøkini hava funnið ein form, sum hóskar til teirra. Fyrireikararnir av Fjarðafestivalinum tosaðu í ár meira beinleiðis enn undanfarin ár um, at Fjarðafestivalurin var ein kristin festivalur fyri kristin fólk”**

*Niels Arge Galán*
*Forsangari í punkbólinum 200*

**“Eg sakni tað orrrrrdiliga stóra navnið onkustaðni. Góðskan er har, men av tí at einki navn ordiligur skilur seg út og dregur fólk, kann vandi verða fyri, at teir seinastu 2000 festivalgestirnir halda seg aftur”**

